# Stórsigur á Sevmýru

TB gjørdi bart, tá teir í fyrsta landskappingardystinum á árinum høvdu vitjan av B71.

Undan dystinum hevur nakað verið tosað um, at tað fór at gerast tungt hjá TB, nú teir mugu vera Óla Johannesen fyriuttan í nakrar dystir, men sunnudagin sýndu teir so, at liðið eisini hevur aðrar fræggar leikarar.

Sandoyingar fingu snøgt sagt ikki eitt beint til jørðina fyri steðgin, og tað eydnaðist eisini TB at skapa sær eina trivaliga leiðslu hesi fyrstu trý korterini.

Eftir steðgin dalaði ferðin sum vera man, í vanda komu stigini ongantíð, og fyri fyrst kann TB í øllum førum rópa seg oddalið. Ein støða, sum teir ivaleyst stremba eftir at halda seytjan umfør afturat.

**- jm**

**TB-B71 6-2 (4-0)**
1-0: Einar Petersen
2-0: Kaj Roest
3-0: Hallur Christiansen
4-0: Eyðun Svalbard
5-0: sjálvmál
6-0: Kaj Roest
6-1: Clayton Soares
6-2: Clayton Soares

# Tøl kunnu lúgva

FS Vágar vann ein at síggja til tryggan sigur, tá teir leygardagin høvdu vitjan av Royn.

Dysturin endaði 4-1, men leingi sá alt annað enn gott út hjá vertunum. Tíðliga í dystinum legði Eyðstein Jacobsen eisini gestirnar framum, men hóast royndi Birgir Joensen síðani javnaði, tóktist tað ganga striltið hjá heimaliðnum at skapa sær neyðugu yvirvágina.

Og tá Sonni Johansen so eisini fekk reytt kort seint í dystinum, tóktist døpru útlitini at gerast enn verri, men onkursvegna gjørdist her talan um eina positiva vend.

Per Joensen kom á vøllin, og hann var eisini maðurin, sum legði heimaliðið framum, og bólturin var ikki meira enn givin upp, so stóð 3-1 á talvuni.

Seinastu løtuna tveittu gestirnir so nógv fólk fram í royndunum at vinna tað mista aftur, men tað kostaði í hinum endanum, har brasilski Wellington kundi endaliga staðfesta sigurin.

**-jm**

**FS Vágar-Royn 4-1 (1-1)**
0-1: Eyðstein Jacobsen
1-1: Birgir Joensen
2-1: Per Joenswen
3-1: John Johansne
4-1: Wellington

# Danmarksmeistarar úr Havn

**Gentuliðið hjá Havnar Fimleikafelag vant burturúr mótstøðuni, tá kappst varð um DM-heitið í rútmiskum fimleiki um vikuskiftið**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*



*Genturnar hjá Havnar Fimleikafelag vóru nærum hálvt annað stig betri enn besta danska liðið, tá DM í rútmiskum fimleiki fyri lið var á skránni*

Sum føroyameistarar fingu genturnar hjá Havnar Fimleikafelag møguleika at luttaka sum gestalið í kappingini um danska meistaraheitið í rútmiskum fimleiki, og her gekk framúr væl hjá føroyska liðnum.

Tær fingu ikki færri enn 37,8 stig av 40 møgulium, og endaðu sostatt 1,45 stig frammanfyri besta danska liðið.

Fyrst bleiv tann fría serian framførd, og fyri hana fingu tær 19,15 stig. Øbro var nærmast teimum og fingu Øbrogenturnar 18,15 stig – við øðrum orðum vóru tær eitt heilt stig aftan fyri genturnar hjá HF.

Síðan framførdu tær amboðsseriuna (hondamboðið er bóltur) og fyri hana fingu tær eisini hægsta stigatal, nevniliga 18,65. Nærmastu kappingarneytarnar fingu 18,25 fyri bóltaseriuna.

**Úrslit fyri tey fremstu liðini:**
Fría serian
Amboðsserian
Tilsamans

| | | | |
|---|---|---|---|
| HF | 19,15 | 18,65 | 37,80 |
| Øbro | 18,15 | 18,20 | 36,35 |
| Farum | | | |
| GF | 17,80 | 18,25 | 35,85 |
| Greve | 17,60 | 17,70 | 35,30 |

Tá stórkappingin var her heima, fekk HF niðanfyri standandi karakterir:

| | | | |
|---|---|---|---|
| HF | 17,96 | 18,06 | 36,02 |

Genturnar koma heimaftur týsdagin, og tá verður móttøka í Høllini á Stórheyggi.

Hóast tær hava fingið hægsta stigatali, so fingu tær eingi gullmerkir. Orsøkin er, at vit kunnu ikki luttaka í kappingini sum føroyingar.

## Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Esbjerg | 27 | 16 | - | 8 | - | 3 | 60 | 30 | 30 | 56 |
| 2 FCK (M) | 27 | 16 | - | 7 | - | 4 | 43 | 22 | 21 | 55 |
| 3 Brøndby (S) | 27 | 16 | - | 6 | - | 5 | 45 | 24 | 21 | 54 |
| 4 OB | 27 | 14 | - | 6 | - | 7 | 55 | 38 | 17 | 48 |
| 5 AaB | 27 | 12 | - | 7 | - | 8 | 40 | 36 | 4 | 43 |
| 6 Viborg | 27 | 10 | - | 8 | - | 9 | 42 | 34 | 8 | 38 |
| 7 FCM | 27 | 10 | - | 6 | - | 11 | 50 | 41 | 9 | 36 |
| 8 AGF | 27 | 9 | - | 3 | - | 15 | 37 | 54 | -17 | 30 |
| 9 Herfølge | 27 | 7 | - | 6 | - | 14 | 25 | 37 | -12 | 27 |
| 10 FC Nordsj. | 27 | 6 | - | 8 | - | 13 | 28 | 50 | -22 | 26 |
| 11 Frem | 27 | 6 | - | 3 | - | 18 | 29 | 50 | -21 | 21 |
| 12 AB | 27 | 5 | - | 2 | - | 20 | 22 | 60 | -38 | 17 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

**Danska 1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Silkeborg | 21 | 15 | - | 4 | - | 2 | 44 | 14 | 30 | 49 |
| 2 AC Horsens | 21 | 15 | - | 2 | - | 4 | 35 | 14 | 21 | 47 |
| 3 Randers FC | 21 | 14 | - | 3 | - | 4 | 55 | 32 | 23 | 45 |
| 4 Sønderjyske E | 21 | 12 | - | 4 | - | 5 | 53 | 28 | 25 | 40 |
| 5 Køge | 21 | 11 | - | 5 | - | 5 | 39 | 30 | 9 | 38 |
| 6 Skjold | 21 | 10 | - | 4 | - | 7 | 43 | 33 | 10 | 34 |
| 7 Ølstykke | 20 | 10 | - | 1 | - | 9 | 44 | 38 | 6 | 31 |
| 8 Fredericia | 21 | 7 | - | 7 | - | 7 | 29 | 31 | -2 | 28 |
| 9 Nykøbing | 20 | 8 | - | 3 | - | 9 | 32 | 33 | -1 | 27 |
| 10 FC Nordjylland | 20 | 7 | - | 5 | - | 8 | 22 | 29 | -7 | 26 |
| 11 Fremad Amager | 21 | 5 | - | 6 | - | 10 | 30 | 37 | -7 | 21 |
| 12 B 93 | 20 | 5 | - | 6 | - | 9 | 28 | 35 | -7 | 21 |
| 13 Brønshøj | 21 | 5 | - | 4 | - | 12 | 26 | 48 | -22 | 19 |
| 14 Vejle | 21 | 4 | - | 5 | - | 12 | 27 | 44 | -17 | 17 |
| 15 FC Aarhus | 21 | 4 | - | 2 | - | 15 | 20 | 48 | -28 | 14 |
| 16 B 1913 | 21 | 1 | - | 5 | - | 15 | 14 | 47 | -33 | 8 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen, (Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Næstved | 21 | 13 | - | 4 | - | 4 | 46 | 18 | 28 | 43 |
| 2 Dalum | 21 | 13 | - | 4 | - | 4 | 51 | 30 | 21 | 43 |
| 3 HIK | 21 | 11 | - | 6 | - | 4 | 43 | 31 | 12 | 39 |
| 4 Holbæk | 21 | 10 | - | 5 | - | 6 | 37 | 30 | 7 | 35 |
| 5 Kolding FC | 21 | 9 | - | 5 | - | 7 | 36 | 33 | 3 | 32 |
| 6 Slagelse | 21 | 9 | - | 4 | - | 8 | 37 | 31 | 6 | 31 |
| 7 B1909 | 21 | 9 | - | 3 | - | 9 | 39 | 34 | 5 | 30 |
| 8 Brabrand | 20 | 8 | - | 5 | - | 7 | 41 | 30 | 11 | 29 |
| 9 Jetsmark | 20 | 7 | - | 6 | - | 7 | 29 | 35 | -6 | 27 |
| 10 Lyngby | 21 | 6 | - | 8 | - | 7 | 36 | 42 | -6 | 26 |
| 11 Kalundborg | 21 | 6 | - | 6 | - | 9 | 45 | 49 | -4 | 24 |
| 12 Holstebro | 21 | 6 | - | 4 | - | 11 | 36 | 46 | -10 | 22 |
| 13 Glostrup | 21 | 6 | - | 4 | - | 11 | 31 | 43 | -12 | 22 |
| 14 Hvidovre | 21 | 5 | - | 6 | - | 10 | 23 | 40 | -17 | 21 |
| 15 Hjørring | 21 | 6 | - | 3 | - | 12 | 27 | 57 | -30 | 21 |
| 16 Skive | 21 | 5 | - | 3 | - | 13 | 37 | 45 | -8 | 18 |

## Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 0 | 4 | 3 |
| 2 Skála | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 3 GÍ | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 4 KÍ | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 VB | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 NSÍ | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 7 ÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 8 B68 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 9 HB | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 10 EB/Streymur | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 4 | -4 | 0 |

## Støðan, 2. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 3 |
| 2 FSV | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 1 | 3 | 3 |
| 3 B36 | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 4 VB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 5 AB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 6 KÍ | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 7 Sumba | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 8 LÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 9 Royn | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 4 | -3 | 0 |
| 10 B71 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 2 | 6 | -4 | 0 |




**Til foreldur at børnum í Skála skúla**

Uppstillingarfundur til skúlastýrisvalið 25. mai 2004.

Mikukvøldið 5. mai kl. 20.00 verður fundur í skúlanum.

**Skrá:**
- kunning um valið
- kunning um virksemið í skúalstýrinum

**Møguleiki verður**
- at seta spurningar og
- at gera uppstillingarlistar.

Møtið fjølment!

**Valnevndin fyri Skála skúla**



Starvslýsingar




á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)
1 vika kr. 500,-
2 vikur kr. 750,-
til freistin at søkja er úti: kr. 1.000,-

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)
1 vika kr. 750,-
2 vikur kr. 1.000,-
til freistin at søkja er úti: kr. 1.250,-

2 lýsingar = -20% í avsláttri
3 ella fleiri = -30% í avsláttri

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo



**Góðir brúktir bilar**

**Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000 — **72.000**
**Opel Agila 1.2** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- — **nú 95.000**
**Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000 — **67.000**
**Opel Corsa 1.4 Swing** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 84.000 — **68.000**
**Peugeot 106 Diesel** v/ nýggjum motori, bláur, árg 1996, 3 hurðar, km 93.000 — **58.000**
**Opel Astra 1.6 16V** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000 — **112.000**
**Peugeot 306 XR 1.9 Diesel** *hevur motorbrek,* grønur, árg 1995, 5 hurðar, km 152.000 — **28.000**
**Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, *sýn 24/03/04* — **95.000**
**Peugeot 206 XR 1.4** bláur, árg 2001, 3 hurðar, km 35.000 — **98.000**
**Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000 — **155.000**
**Peugeot 206 XR 1.4** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km 58.000 — **108.000**
**Citroen Berlingo 1.8 Multi Space v/aircondition** grønur, árg 1999, 4 hurðar, km. 90.000 — **90.000**
**Peugeot Expert Combi 2.0 Hdi 110 HK, 8 sitipláss** bláur, árg 2003, 4 hurð., km. 19.000 — **259.000**
**Seat Cordoba 1.9 D Station Car** gráur, árg 2000, 5 hurðar. km. 38.000 — **109.000**
**Peugeot 406 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 63.000 — **130.000**
**Toyota Corolla 1.6** vínreyður, árg 1989, km. 152.000 — **18.000**
**Peugeot Partner 1.9 D** vínreyður, árg 1999, 3 hurðar, km. 96.000 — **89.000**
**Citroen Xantia 2.0 Hdi Station Car** grønur, árg 2000, km. 110.000, *sýnaður: 19/03/04* — **148.000**
**Peugeot Boxer 2.8 HDi 330 MH Van** hvítur, árg 2002, 4 hurðar — **v/mvg 160.000**
**Hyundai Accent 1.5 AirCon** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km 92.000 — **89.000**

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

Sosialurin 341800

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



zarepta

DÝRABIÐIDAGSLEGA
FAMILJULEGA FYRI BREKAÐ

**Hjartaliga vælkomin á familjulegu í Zarepta í døgunum 6.-9. mai 2004**

Legan er ætlað øllum, ið bera brek, og familjum teirra.

Á leguni, sum verður myndað eftir luttakaraynski, er millum annað:

*Fyrilestrar, pallborð, samtalubólkar, andakt, kvøldsøga, sangur, tónleikur, leikvenjing, fimleikur, ríðing, svimjing, túrar, spæl úti og inni, ymisk ítriv og video.*

**Havi hetta við:**
1. Dýnuvár, koddavár og lak
2. Um tú verður við á túrum og til svimjing:
   - heit klæði, gonguskógvar, regnklæði, gummistivlar og svimjiklæði

**Kostnaður fyri leguna:**
Vaksin kr. 300,-
Børn 6-14 ár kr. 150,-
Børn 0-5 ár ókeypis
Konto í peningastovnunum

Nátturði verður boðin frá kl. 19.30 hóskvøldið
Legan verður sett hóskvøldið kl. 21.00
Húsið er opið kl. 18.00

**Ringið til ein av undirritaðu, um spurningar eru í samband við leguna:**
Elisabeth Mortensen Tel 31 72 44
Annika Gaard Tel 31 41 07
Samly Reinert Tel 31 87 20
Jógvan Tróndheim Tel 45 68 22
Diana í Puntabyrgi Tel 31 65 10

**NB! Tilmelding í seinasta lagi fríggjadagin 30. apríl**
hjá Onnu á Dul Mørkøre, teldupost:
abmorkore@kallnet.fo - tel 31 52 80 - 51 52 80

**Verið vælkomin til zarepta**



Sosialurin
www.sosialurin.fo



**Skúlastýrisval Skála skúli**

Vallistin til skúlastýrisvalið tann 25. mai 2004 liggur frammi í skúlanum og á kommunuskrivstovuni til 10. mai 2004.

Fólk, sum ikki eru á vallistanum, og sum hava valrætt og valbæri, skulu venda sær til skúlan í seinsta lagi 18. mai 2004 við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

**Skála Kommuna**
**Valnevndin**



Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo